# Verður føroyska málið lagt í spennitroyggju?

ABSALON ABSALONSEN
Á Norðasta Horni
26.juni 2009



Hendan spurningin setti eg mær sjálvum nú ein dagin.

Sá í einum av bløðunum, at onkur hevði hug at brongla vakra staðarnavnið Tjaldavíkshólmur til Tjaldarvíkarhólmur, helt tað ljóða andskræmuligt.

Tað kann ikki bera til, at hópur av vøkrum gomlum staðarnøvnum eru málvillur.

Leirvíksfjørður, Rituvíkshálsur, Tjaldavíkshólmur, Tjørnuvíksstakkur, Kvívíksskor, Leirvíksfjall, Øravíkslíð, Sandvíksfles og mong onnur av sama slag - eru hesi nøvnini málvillur?

Tað kann ikki vera satt, at teir gomlu, sum settu nøvn á hesi støðini í forðum vóru eiðasørir í málbrúki. Teir høvdu ikki gingið á lærdar háskúlar, men tað er hóast alt frá teimum, málið er komið.

Hvussu við persónum, sum til dømis vóru nevndir Leirvíks-Páll ella Kvívíks-Tummas? Havi lagt til merkis, at onkur hevur skrivað Kvívíkar Tummas, haldi ikki, tað fellur líka væl sum Kvívíks-Tummas.

Fyri 100 árum síðani búði tiltikin sjógarpur og skilamaður í Vági nevndur Kvívíks-Jógvan, trúgvi neyvan, nakar hevði fingið seg at nevnt hann Kvívíkar-Jógvan, og man ikki mangur góður maður hava fingið sær eina skálvíksgentu til konu? Hevði onkur sagt, at hon var skálavíkargenta, høvdu tey gomlu helst talað at og rættað.

Eg loyvi mær at spyrja tey málkønu, um ikki kvenkynsorðið vík endar við s í hvørsfalli, tá tað stendur millum tvey onnur navnorð til dømis í samansettum staðarnøvnum?

**Her eru nøkur dømi:**
Leirur-vík-fjørður
Leirvíksfjørður
Tjald-vík-hólmur
Tjaldavíkshólmur
Rita-vík-hálsur
Rituvíkshálsur
Tjørn-vík-stakkur
Tjørnuvíksstakkur
Leirur-vík-fjall
Leirvíksfjall
Sandur-vík-fles
Sandvíksfles

Øðrvísi er, tá tvey navnorð eru samansett og enda við vík. Vit fara um Leirvíksfjørð til Leirvíkar, um Riruvíksháls til Rituvíkar og gjøgnum Øravíkslíð til Øravíkar, og mætur garpur varð nevndur Leirvíks-Páll, men onkuntíð kom hann til Leirvíkar. Kvívíks-Jógvan búsettist í Vági og fór ikki aftur til Kvívíkar.

Um hetta er skeivur málburður, vóni eg, at onkur við røttum førleika vegleiðir meg.

Eg ivist ikki í, at fleiri enn undirritaði sita við sama spurningi, vóni tí at fáa skilagott og sakligt svar.

# Sjúklingar rópa neyðarróp á Kringvarpið

GUTTORM ANDREASEN

Hvønn dag í fleiri mánaðir nú hevur Sjónvarpið hjá Kringvarpinum lýst við, at teirra føroysku sendingar eru at síggja beinleiðis á netinum. Og hvørja ferð sita vit sjúklingar her á Sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn spent og bíða. Serliga er tað Dagur og Vika og kristiligu sendingarnar, sum vit gleða okkum til, og sum sjúk og eldri fólk helst vilja síggja. Men gakk! Vit klikkja og klikkja og bíða í tolni, men onki kemur á skíggjan. Høvdu tit so av illum sett ein tekst á, sum boðaði frá, at sendingin kortini ikki kemur, so vistu vit tað um ikki annað. Í staðin sita vit og føla okkum hildin fullkomiliga fyri gjøldur av Sjónvarpinum.

Tá tað kemur til at leggja sendingar út á netið annars, er støðan onki frægari og mest sum vindurin blæsur. Til dømis vóru sendingarnar frá 22. og 23. juni ikki lagdar út á netið fyrr enn klokkan 23, also á midnátt danska tíð, tá øll langt síðani vóru farin í song. Og at hyggja eftir røstum tíðindum dagin eftir, tímir ongin.

Lat meg minna á, at allir vit sjúklingar her á Sjúklingahotellinum hava goldið kringvarpsgjald umframt 69 milliónir umvegis skattin. Tí haldi eg ikki, at tað er ov nógv at krevja, at vit fáa hasa netvarpstænastuna, sum tit lýsa so nógv fyri. Ein slík tænasta átti nettup at komið føroyingum til góðar, sum vegna sjúku eru noyddir at fara av landinum ofta í longri tíðarskeið. Tað er nóg ringt at skapa sær ein vanligan gerandisdag aftur heima eftir drúgva sjúkralegu uttanlands, og tað ger tað ikki lættari, tá vit als ikki kunnu fylgja við í prátinum um hendingar og tíðindi, sum hava verið á breddanum, og sum fólk heima tosa um.

Sjálvur havi eg verið her á Sjúklingahotellinum í 8 mánaðir nú, so eg veit, hvat eg tosi um. Og eg eri ikki einsamallur, tí allir hinir á leið 50 sjúklingarnir her kenna seg eisini stak vónsviknar av Kringvarpinum.

Eg havi nú fleiri ferðir ringt til Kringvarpið fyri at fáa tykkum at rætta hetta óskilið, men tað er sum at sletta vatn á gás. 8 tær seinastu Dagur og Vika sendingarnar hava ikki verið sendar beinleiðis, sjálvt um Sjónvarpið hevur lýst við tí hvørja ferð.

Tí fari eg enn einaferð vegna bæði meg sjálvan og hinar sjúklingarnar her á Sjuklingahotellinum at heita á Kringvarpið um at fáa hetta í rættlag, ongantíð ov skjótt. At okkara einasti almenni public service stovnur ber seg soleiðis at móti nøkrum av sínum trúgvastu hyggjarum, sum ikki hava annan møguleika at fylgja við føroysku sendingunum, hoyrir ongastaðni heima.

# Fakfeløg ræðast og hótta politiska myndugleikan

LASSE KLEIN



**Hóast fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum siga seg ræðast politisk inntriv, sum áður hava verið framd, so er tað kortini sera ivasamt, um tey komu so illa burtur úr politisku tiltøkunum í 90-unum, sum tey vilja verða við. Í sama mun sum onnur blivu tey ikki rikin frá húsi og heimi ella fluttu av landinum**

Hevði als ikki ætlað mær at gjørt viðmerkingar til nakað sum helst tjak, nú landsstýrið fyrireikar kreppupakka fyri at tálma hallið á landskassanum í ár og komandi ár, men tá eg kortini havi gjørt av at bróta hetta lyfti, so er tað orsaka av hugburðinum, sum alment lønt starvsfólk gjøgnum fakfeløg teirra geva til kennar, nú tað hoyrist, at landsstýrið møguliga ætlar at nerta við sáttmálarnir hjá alment løntum starvsfólkum fyri at avmarka hallið á landskassanum.

Fyri fakfeløgini er sáttmálin sjálvandi serstakur, sum ikki politiskt skal broytast, og tað skal hann heldur ikki, undir vanligum umstøðum.

Fakfeløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum siga seg ræðast inntrivini, sum gjørd vóru kreppuárini í 90-unum, og tiltøkini vóru ikki tespilig, sparingarnar og inntrivini gjørdust av somu orsøkum ógvuslig, men kortini var tað undrunarvert, hvussu lítið inntrivini kortini ávirkaðu limirnar sum høvdu sáttmálar við tað almenna.

Sjómenn, handverkarar og fólk í sjálvstøðugum arbeiði blivu rikin frá húsi og heimi, og nógv fluttu av landinum fyri at lívbjarga sær og familjum sínum.

Hetta hendi meðan støðan hjá teimum alment løntu starvsfólkunum var heilt øðrvísi hóast inntriv á sáttmálaøki teirra. Har báðir hjúnafelagarnir vóru alment løntir, ávirkaði krepputiltøkini lítið og einki. Í staðin fyri tvær fløskur av reyðvíni 14. hvønn dag, var einans neyðugt við einari fløsku 14. hvønn dag. Hjá teimum vóru nærum ongar broytingar, og har annar parturin var alment løntur, hóraðu tey so dánt undan, uttan kortini at líða somu lagnu, sum øll hini sum ikki høvdu lønarsáttmála við tað almenna. Men sjálvandi vóru onkur undantøk, treyðugt so.

Tað er sjálvandi harmiligt, at slíkt skal henda, men tá tað kortini hendi í 90-unum, so var tað tí, at lønarútreiðslurnar hjá tí almenna vóru ein so stórur og ógvusligur partur av almennu útreiðslunum. Tað sama er galdandi í dag.

Neyðugt er at tálma landskassans útreiðslur komandi árini, og tí slepst ikki undan eisini at tálma lønarvøkstrinum, og finst ikki forstáilsi fyri tí, so er í størri mun neyðugt at siga fólki upp hjá tí almenna, so einfalt er tað, og tað er eftir mínum tykki stórt spell, at fakligur stoltleiki skal forða fyri broytingum – sum kortini ikki broyta lívskorini hjá limunum avgerandi.

Tað var eingin løtt uppgáva at endurreisa føroyska búskapin aftan á kreppuárini í 90-unum, men tiltøkini hjálptu, og hava eisini síðani verið til gagns fyri arbeiðsmarknaðin hjá teimum alment settu starvsfólkunum.

Vit hava tíverri lyndi til at gloyma, men tað er hóast alt ikki meira enn 16 – 17 ár síðani endurreisingin frá kreppuni í 90-unum byrjaði, og hóast tey sum í dag hava ábyrgd á mongum økjum, tá vóru í fermingaraldri, høvdu fingið húgvuna á høvdið, ella júst tikið koyrikort, tá kreppan byrjaði, so eiga tey og vit – kortini at læra av fortíðini.

Heimurin uttan um okkum hevur framt, og fremur broytingar í mun til broyttar umstøður, og tað sleppur føroyska samfelagið heldur ikki undan.

# Dialogen, der blev væk

MORTEN HUST PETERSEN

Har dialogen spillet fallit, er den druknet i snakken om global krise, hjælpepakker, konkurser og arbejdsløshed.

Hvor er vi som samfund på vej hen hvis dialogen bliver til en monolog??? Hvordan ønsker man fra undervisningsministeriet at fremstå i denne krisetid, der har ramt alle lag i samfundet, vil man agere/reagere eller blot forsøge at tie og håbe på, at det går væk af sig selv.

Situationen er den, at jeg er leder på døgninstitutionen Rásin, der er en skole for unge udviklingshæmmede under Mentamálaráðið. Tilbage i februar måned fandt jeg ved et tilfælde ud af, at jeg var blevet beskåret med 10% af mit budget fra 2008, eller hvad der svarer til 12½% af lønbudgettet på Institutionen. Dette kom som lidt af et chok, da jeg tilbage i november 2008 fik tilsagn (fra MMR) om, at dette års budget ville være det samme som i fjor.

Derfor henvendte jeg mig straks til MMR, for at få en forklaring fra (Janus Jensen) ansvarshavende, men uden held... Jeg efterlod utallige beskeder til både ham og hans sekretær, sendte en e-mail, hvor jeg bekendtgjorde min undren over, at jeg intet havde fået at vide herom, og opfordrede til en dialog om evt. besparelser. Ingen af delene gav pote, i stedet blev jeg bare mødt med tavshed, hverken mine opkald eller mail (afsendt d. 4/2-2009) blev besvaret.

Da jeg efter en måned stadigvæk intet havde hørt, forsøgte jeg at gå til toppen af MMR (Helena Dam) for at opfordre til en dialog og få en forklaring på denne fejl, men landsstyrekvinden var umulig at få fat på, selvom jeg lagde utallige beskeder hos hendes sekretær og sendte hende en mail d. 19/3-2009, har jeg her 3 mdr. efter stadigvæk intet hørt fra hverken landsstyrekvinden eller MMR.

Nu var gode råd dyre, da jeg ikke ønsker at se stiltiende til denne form for mafiametoder og fortielse.

I denne her sammenhæng er det er vigtigt at undestrege, at Rásin er en skole, men som konsekvens af de evt. nedskæringer har vi ikke råd til at ansætte en timelærer til undervisning i f.eks. færøsk og matematik.

Så derfor bliver undervisningen varetaget af pædogoger og medhjælpere, dette er langt fra optimalt. Jeg kunne selvfølgelig vælge af afskedige et personale for at få råd til dette.... Men det kan ikke lade sig gøre at køre en institution med døgnåbent med kun 4 personale, medmindre døgnet bliver forkortet med 1½ time.

Jeg tog kontakt med Føroya Pedagogfelag sidst i marts måned for at få dem på banen, siden har de også forsøgt at få både de ansvarshavende i MMR og landsstyrekvinden i tale, men uden held.

Så dette brev er min sidste udvej for at opfordre til dialog fremfor fortielse og handlingslammelse. Da man ifølge forvaltningsloven fra 10. juni 1993, har krav på svar når man retter henvendelse til en offentlig myndighed.

Hvor er samfundet på vej hen, hvis man fra undervisningsministeriets side bare skærer i skolers og institutioners budgetter uden at give de involverede parter bud herom, og er det i det hele taget lovligt??? Når man så søger en forklaring/dialog bliver man bare ignoreret... er en af grundstenene i et demokratisk samfund ikke dialog???

Med håb om en eller anden form for reaktion/aktion fra MMR.

De bedste sommerhilsener fra alle os her på Rásin.

Mobil: 215202
Mail: Rasin@skulin.fo

Nu har I mine kontakt informationer, så burde der ikke være nogen undskyldning for ikke at kunne få fat på mig, jeg er altid åben for en DIALOG.